fylgiskjal 4

# Felagið Føroyskir Grannskoðarar

**Uttanríkis- og Vinnumálaráðið**
Gongin 7
Postboks 377
110 Tórshavn
uvmr@uvmr.fo

B20190110HoyringssvarðVáttanarkunngerð
Tórshavn, tann 12.02.2019

**Viðvíkjandi Uppskoti til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg (Skráseting av veruligum eigarum)**

Vísandi til t-post tykkara frá 4. februar 2018 har omanfyri nevnda uppskot til kunngerð verður sent Felagnum Føroyskir Grannskoðarar til hoyringar.

Nevndin í FFG hevur gjøgnumgingið uppskotið og tekur undir við endamálinum, at lóggávan í Føroyum skal vera á sama støði sum reglurnar í okkara grannalondum í sambandi við tiltøk móti hvítvasking og fígging av yvirgangi.

Vit skulu gera vart við, at núverandi áseting í grein 58 í Vinnufelagslógini, um at føra eina eigaraskrá í kt-skipan hjá Skráseting Føroya, ikki hevur verið yvirhildin higartil. Orsøkin er okkum kunnugt, at Skráseting Føroya ikki hevur tílíka kt-skipan, ella í øðrum lagi, ikki hevur havt orku at fáa til vega og viðlíkahalda slíka skipan.

Við uppskotinum verður harvið lóggivið um nýggj skrásetingarkrøv viðvíkjandi veruligum ella legalum eigarum, hóast Skráseting Føroya, okkum kunnugt, ikki hevur neyðugu kt-skipanina til at halda verandi krøv um skráseting av formligum eigarum.

Tað er okkara fatan, at tað munar einki at seta nýggjar og herdar reglur í verk, um ikki verandi reglur vera hildnar.

Við uppskotinum verður lagt upp til, at felagið hevur skyldu at skráseta upplýsingarnar, meðan einki verður sagt um, hvussu ansast skal eftir, at skrásetingarnar eru rættar. Um einki eftirlit er við, at skrásetingarnar eru rættar, so er sum heild øktur vandi fyri feilum, og spurningar kunnu setast við, hvussu álítandi skrásetingarnar eru.

Sambært lógini um fyribyrgjandi tiltøk móti hvítvasking av vinningi og fígging av yvirgangi ("hvítvasklógin"), hava peningastovnar, tryggingarfeløg, grannskoðarar og aðrir ráðgevarar skyldu til at fáa til vega og goyma skjalprógv fyri eigaraviðurskiftunum, sum uppskotið viðvíkur. Sambært verandi lóggávu brúka øll, sum eru fevnd av hvítvasklógini, stóra orku upp á hvør í sínum lagi at fáa til vega og goyma skjalprógv fyri veruligu eigarunum.

Við tað at tað í nógvum førum eru fleiri partar, sum gera sama arbeiði, til dømis bæði peningastovnurin og grannskoðarin hjá einum felagi, so verður í løtuni brúkt óneyðuga nógv orka til hetta. Við hesum uppskotinum um eitt alment yvirlit er møguleiki fyri at lætta munandi um arbeiði hjá øllum, sum eru fevnd av hvítvasklógini og harvið hjá feløgunum og vinnulívinum sum heild.

Avgerandi fyritreytin fyri hesum er tó, at skrásetingarnar eru álítandi. Ein møguleiki er, at Skráseting Føroya skal føra leypandi eftirlit við rættleikanum í skrásetingunum.

**Viðmerkingar til petti 2.3 um avleiðingar fyri vinnuna**
Undir petti 2.3 um avleiðingar fyri vinnuna verður sagt, at

*"Uppskotið hevur við sær skyldu hjá grannskoðaranum við tað, at hann skal ansa eftir, at skráseting av veruligum eigarum verður framd, og at neyðug skjalprógv verður goymd um royndir at eyðmerkja veruligar eigarar. Umsitingarligu avleiðingarnar eru avmarkaðar, tí tað sambært allýsingini verður eitt avmarkað tal av persónsskrásetingum, og tí tað bert er skrásetingin, ikki um skrásetingin er rætt, sum grannskoðarin skal ansa eftir."*

Umrøðan av okkara eftirkannan av, at skrásetingin verður framd, er greið og í samsvari við ásetingarnar í grein 147, stk. 2 í Vinnufelagslógini um, at grannskoðarin skal ansa eftir, at felagið lýkur sínar skyldur til at gera og føra yvirlit.

Hinvegin tykist tað ikki heilt greitt, hvat tað merkir, at ansa eftir, at *"neyðug skjalprógv verður goymd um royndir at eyðmerkja veruligar eigarar"*, og hvør lógarheimildin fyri hesum er.

Tað skal viðmerkjast, at vit ikki hava gjøgnumgingið uppskotið við atliti at meta um, hvørt løgfrøðiligu viðurskiftini eru í lagi.

Eru spurningar ella ivamál, eru tit sjálvandi altíð vælkomin at seta tykkum í samband við okkum.

Við heilsan

Felagið Føroyskir Grannskoðarar

| | | | |
|---|---|---|---|
| Heini Thomsen<br>formaður | Olaf Frits Joensen<br>næstformaður | Jóhannes Færø<br>peningarøkil | Mark T. Højgaard<br>skrivari |